# Vágbingar fáa nú ein hin kendasta trolara í Íslandi

*Fyrsta dagin kemur nýggi rækjutrolarin hjá vágbingum. Hann er í sera góðum standi og tað eru heilt aðrir møguleikar við honum, enn við tí bátinum, sum teir høvdu frammanundan*




*Hetta er nýggi rækjutrolarin hjá vágbingum, og hann kemur higar seinni í hesi vikuni, ella fyrst í næstu viku. Hann er keyptur ístaðin fyri South Island. Men við hesum bátinum hava vágbingar nógv betri møguleikar, tí hann tekur næstan tvær ferðir so nógv, og er hartil betri útgjørdur enn tann gamli*

ÁKI BERTHOLDSEN

Navnframi íslendski trolarin „Bessi“ kemur nú undir føroyskt flagg.

Tað eru vágbingar, sum hava keypt trolarin at fiska rækjur við.

Teir hava keypt hann ístaðin fyri South Island, sum varð seld einum amerikanskum felag í heyst.

Tað var beint fyri jól, at felagið P/F Klettur skrivaðu undir sáttmála um at keypa „Bessi“. Men áðrenn báturin kundi yvirtakast skuldu ymsar ábøtur skuldi gerast.

Tær ábøturnar eru nú um at verða lidnar og væntandi kemur báturin til Føroyar seinast í hesi vikuni ella fyrst í næstu viku

Fyrst verður farið til Vágs at heilsa uppá vágbingar.

Men síðani skal hann aftur á skipasmiðju, har ymsar broytingar skulu gerast á sjálvari verksmiðjuni.

Eli Frederiksen, reiðari, væntar, at hann verður klárur at fara til fiskiskap seinast í februar.

Hesin nýggi báturin skal eisini eita South Island, eins og tann gamli gjørdi.

**Navnframur trolari**

„Bessi“ varð bygdur í 1989 og flestu sjómenn kenna hann, tí hann fiskaði avbera væl. Men í 1996 varð hann umbygdur til rækjur, so øll úgerðin er at kalla nýggj.

**Nógv betri møguleikar**

Nú hava so vágbingar keypt hann fyri ímillum 50 og 60 milliónir.

Hann skal fiska fyri góðar 30 milliónir um árið fyri at bera seg.

Men tað heldur Eli Frederiksen, at góð útlit skuldi verið til. Tí hann sigur, at hesin báturin er væl størri og betri útgjørdur enn gamli South Island

Sostatt hava teir eisini nógv betri møguleikar at fiska við honum, enn teir høvdu við tí gamla.

Tann nýggi South Island er 60 metrar langur og hann tekur næstan 500 tons, so talan er um eitt heilt annað skip.

Hann hevur trý spøl so teir fáa trola við tveimum trolum

– Alt hetta ger, at møguleikarnir fyri einum góðum rakstri eru nógv betri við hesum bátinum, enn við tí gamla, sigur reiðarin.

Hann sigur, at nú fáa teir gjørt longri túrar, og hann væntar eisini, at teir fara á Flemmish Cap við hesum nýggja bátinum.

Har hava føroyingar felags fiskidagar men við gamla South Island gjørdu teir bara nakrar fáar túrar á Flemmish Cap.

Annars verður tað tann vanligi fiskiskapurin við Svalbarð. Men teir hava onga kvotu undir Eysturgrønlandi.

Teir verða einir 16-18 mans við tí nýggja skipinum. Við gamla South Island vóru teir 14 mans. Teir, sum vóru við gamla South Island fylgja við umborð á tann nýggja, og so skulu nakrir við afturat.

So er bara at vóna, at sama góða eydna, ið fylgdi bátinum ímeðan hann var á íslendskum hondum, eisini fer at fylgja honum, nú hann er kemur undir føroyskt flagg.

# Nýggj matstova latin upp í Hvalba

*Nú ber til at biðja um mat og fáa hann koyrdan til hús*

ÁKI BERTHOLDSEN

Beint fyri jól læt upp ein nýggj matstova í Hvalba.

Tað eru systrarnar Olga Thomsen og Hildigunn Mortensen, sum hava latið matstovuna Vesturskin upp í hølunum, har Even Skaalum hevði bakarí inntil fyri nøkrum árum síðani.

Har hava tey burgarar, franskar hot-dog, pitabreyð við fyllu, smurt breyð og annað, sum er skjótt at gera.

Men tey hava eisini kaffi, te og ymsar kakur omaná, ella til tey, sum bara vilja hava ein drekkamunn.

Men sum nakað nýtt eru tær eisini farnar at koyra mat heim til fólk, sum biðja um tað, bæði heitar døgverðar, smurt breyð og kalt borð, bæði til bólkar og til einstaklingar.

Olga Thomsen sigur, at tað ber nevniliga til at bíleggja døgverða, kalt borð, ella, hvat tað skal vera og fáa matin koyrdan til hús.

Men tað ber sjálvandi eisini til at koma á matstovuna at eta matin, sum er bílagdur.

Tó er tað tað er neyðugt at bíleggja dagin fyri, ella í seinasta lagi um morgunin, um tað skal gerast til um kvøldið, fyri at tey skulu fáa stundir at gera matin.

Men afturfyri kunnu fólk so eisini næstan fáa, tað tey vilja hava.

**Góða byrjan**

Olga Thomsen sigur, at tey fingu hug at royna hetta, tí frammanundan er ongin slík matstova í Hvalba.

Og verður tosað um at koyra lidnan mat út til fólk, er hetta einasti møguleiki í allari oynni, so vítt tær vita.

Tær hava nú havt opið ein mánaða og tær lata væl at byrjanini.

Tær fingu nógv at gera í sambandi við jólaborðhaldini, tí tað vóru fleiri fyritøkur og felagsskapir sum bíløgdu heitan og kaldan mat til jólaborðhald.

Tær hava eisini gjørt mat og koyrt hann heim til fólk í øðrum sambandi enn til jólaborðhald.




*–Stóri fyrimunurin við nýggju matstovuni er, at nú kunnu suðuroyingar bíleggja mat og fáa hann koyrdan til hús, bæði bæði døgverða og annað. Her stendur annar av stigtakarunum, Hildigunn Mortensen, aftanfyri skivuna og gevur einum at keypa*

Men á matstovuni fáa tey borðreitt fyri 40 fólkum og tær hava eisini fyrispurningar um at halda smærri veitslur í Vesturskin, eitt nú føðingardag. Onkur veitsla hevur eisini longu verið har.

Vesturskin hevur opið frá 16-23 allar dagar.



# Dømd at sita fyri brot ímóti børnum sínum

*Føroya Rættur dømdi fríggjadagin tvey fólk tvey ára fongsulsrevsing fyri annað samband, enn samlegu, við børn yngri enn 12 ár og eisini eru tey dømd fyri blóðskemd*

DAGFINN OLSEN

Ein 40 ára gomul kvinna og ein 32 ára gamal maður vórðu fríggjadagin í Føroya Rætti dømd tvey ára fongsulsrevsing fyri at hava framt brot ímóti børnum sínum.

Tey ákærdu og verjarnir gjørdu av at skjóta málið inn fyri Eystara Landsrætt. Bæði viðvíkjandi revsingini og skuldarspurninginum.

Dómurin er ein hin harðasti í slíkum málum í Føroyum. Rætturin gjørdi eisini av, at tey skuldu vera verðandi í varðhaldinum, meðan Landsrætturin hevur málið til viðgerðar.

Verjarnir mótmæltu hesum og skutu avgerðina inn fyri Eystara Landsrætt, sum kemur til Føroya um góðan mánað.

Bæði fólkini hava verið í varðhaldi, síðani november 1999.

**Blóðskemd**

Dómurin er ikki so harður, sum hann kundi verið sambært ákæruritinum. Hetta kemst m.a. av, at maðurin ikki er funnin sekur í at hava havt samlegu við ein son hjá kvinnuni. Hetta metir Føroya Rættur ikki er prógvað. Heldur ikki er prógvað, at kvinnan skal hava hótt dóttur sína við at drepa hana, tá hon hevði kynsligt samband við hana. Sostatt vórðu maðurin og kvinnan frídømd í hesum báðum ákærum.

Men hinvegin, so eru tey dømd fyri annað kynsligt samband, enn samlegu, við børn yngri enn 12 ár og fyri blóðskemd.

Talan er um 4 børn, sum øll eru avhoyrd. Umframt eru 3 vitni avhoyrd.

**Sjónband**

Avhoyringarnar av tveimum av børnunum vóru gjørdar frammanundan rættarfundinum, og vóru tær so vístar á sjónbandi í rættarhølunum.

Ákærarnir kravdu 3 ára fongsulsrevsing. Verjarnir kravdu frídøming, tí tey ákærdu noktaðu seg sekan í ákærunum.

Ákærur og eisini dómurin umfata kynsligt samband við eina gentu og 3 drongir. Kvinnan er dømd fyri at hava havt kynsligt samband við tveir dreingir, sín egna son og sonin hjá manninum og við dóttir sína.

Maðurin er dømdur fyri brot ímóti øllum dreingjunum. Sínum egna soni og tveimum hjá kvinnuni.

Brotini ímóti børnunum eru nógv í tali og eru framd frá 1990 til 1999.

Ynsgta barnið var um 5 ára aldur, tá brot varð framt.

**Endurgjald**

Rætturin gjørdi av, at maðurin og kvinnan skulu gjalda einum drongi 15.000 krónur í endurgjaldi og hinum báðum 30.000 krónur hvør.

Umframt skal kvinnan gjalda dóttur síni 30.000 krónur í endurgjaldi.

Umframt er sakarmálskostnaður, 37.500 krónur og 50.000 krónur til verjar.

***Kelda: Útvarp Føroya***



*Ein 40 ára gomul kvinna og ein 32 ára gamal maður eru dømd fyri at hava havt annað samnd, enn samlegu, við børn yngri enn 12 ár*

# Kend fólk lata listaverk

*Lions-Club, Klaksvík, skipar fyri áhugaverdum tiltaki, har kendir persónar evna okkurt til, sum kann seljast á uppboðssølu*

DAGFINN OLSEN

Lions-Club í Klaksvík skipar nú fyri forvitnisligum tiltaki.

Felagsskapurin hevur heitt á kendar persónar, um at evna okkurt til. Tað kann vera ein málningur, tekning ella annað, ið fellur viðkomandi lætt.

Ætlanin er so, at lutirnir skulu seljast á uppboðssølu í vár og vinningurin verður latin til vælgerandi endamál.

Kendu persónarnir hava fingið bræv frá Lions-Club nú í januar. Síðani hava teir einar 4 mánaðar at hugsa seg um í. Tann 1. apríl er freistin sett at lata lutirnar inn til Lions-Club.



*Lions-Club, Klaksvík, heitir á kend fólk um at evna okkurt til, sum kann seljast á uppboðssølu*
**(Tilvildarlig mynd)**

**Til leigu**




**Bygningurin í Vágsbotni THE HOUSE OF LEI er til leigu við ella uttan handil um hóskandi boð fæst**

**Spf. Jensen • Tel. 31 47 40**

Sosialurin - 311820